# Fráboðan um seismikkvirksemi

Lýst verður at seismiskar kanningar verða gjørdar innan fyri hesar knattstøður:

61 30,0 N 005 20,0 W
62 00,0 N 003 40,0 W
62 00,0 N 003 02,0 W
61 21,0 N 004 45,0 W
60 15,4 N 006 00,0 W
60 50,0 N 006 00,0 W

Felagið TGS NOPEC kannar økið.

Byrjað verður .................... 26.06.2004
Arbeiðið tekur væntandi ... 4 vikur
Skipanavn ......................... Akademik Lazarev
Kallibókstavar .................... UAJS
Heimstaður ....................... Murmansk
Fiskiveiðiumboð ................ Kári Henriksen

Samband fæst við skipið á VHF rás 16.

Upplýsingar um arbeiðið fáast frá Tórshavn Radio, á heimasíðuni hjá sjóbjargingarstøðini, www.mrcc.fo, ella á telefon 351300.

**Sjóbjargingarstøðin**
Tinghúsvegur 64 · FO-100 Tórshavn
Tlf: 351300 · Fax 351301
mrcc@mrcc.fo · www.mrcc.fo




Søkt verður eftir **klinikkassistenti** at byrja 14. august 2006.

Umsókn við avriti av møguligum prógvi og viðmælum skal sendast Tannlæknastovuni áðrenn 5. juli 2006.

**Tannlæknastovan hjá Steintór Larsen**
Torkilskrókur 8 · FO-530 Fuglafjørður
Tlf. 444358 · stein@online.fo · fax 444602

Gravarhjálp
Marknagilsvegur 86
100 Tórshavn
Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
www.gravarhjalp.net
Sosialurin 341800

# Bygging av raðhúsum við Bólstein

Í sambandi við útstykking við Bólstein í Leirvík, hevur kommunan lagt tvey stykkir út til raðhús.

Víddin á hvørjum stykki er 1.420 $m^2$ . Kostnaðurin fyri lendið er kr. 150,00 pr. m2.

Kommunan hevur gjørt veg til stykkini og innstallatiónir eru lagdar inn á stykkini.

Ætlanin er at byggja raðhús á stykkini, sum skulu fella væl inn í lendið. Byggingin skal tó lúka ásetingar í verandi byggisamtykt fyri Leirvíkar kommunu.

Við tilboðnum skal fylgja skitsuuppskot til bygging.

Byggingin skal byrja í seinasta lagi ½ ár eftir projektgóðkenning og verða liðug sambært ásettari tíðarfreist.

Keyparin skal binda seg til at selja lidnu húsini víðari til tann prísin, ið tilboðið til kommununa er grundað á.

Áðrenn møguligur sáttmáli verður undirskrivaður, skal fyriliggja váttan frá peningastovni um fígging.

Kommunan skilar sær rætt til frítt at velja millum innkomin tilboð ella einki at velja.

Nærri kunning um byggiætlanina og útbjóðingartilfar kann fáast við at venda sær til Leirvíkar Kommunu tlf. 443 006.

Stykkini vera við hesum boðin út til bygging.

Boð saman við uppskoti um bygging skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi 14. august 2006.

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42
Kulibakki 15
520 Leirvík

# Lærari til Hoyvíkar skúla

Søkt verður eftir vikari fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 1. august til 31. desember.

Starvið er 16 undirvísingartímar. 6. árgangur í føroyskum, enskum og ítrótti. 4. árgangur í handaverki og list.

Lønt verður eftir sáttmála við fíggjarmálaráðið.

Umsóknir við upplýsingum um útbúgving og royndum skulu sendast til

Hoyvíkar Skúli

**Hoyvíkar Skúla**
Postrúm 3073
110 Tórshavn

áðrenn 7. juli 2006.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skúlastjóran á tlf. 302590 ella 227603.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ Starvsfólkadeildin

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar til E3/E2

3 avloysarastørv á starvsbrøki 0,9 í skiftandi vaktum eru leys at søkja til setan frá 1. august ella eftir avtalu til og við 31. desember 2006. Møguleiki eru fyri lægri brøkið.

E3 er ein medisinsk deild við í løtuni 5 seingjaplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupedagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.
E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við áhuga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskja-áskoðan og góð samstarvsevni.

Spennandi avbjóðingar liggja fyri framman, tí E3 skal flyta á eina nýrenoveraða deild í B-bygninginum tann 1. januar 2007.
Umvælingarnar byrjaðu 1. maj 2006 á seingjadeildunum B8, B7 og B6. Hesar verða ætlandi lidnar áðrenn 1. januar 2007 so E3 kann flyta yvir tá.
Harumframt er THS (Talgild Heilsu Skipan) ein spennandi avbjóðing. Pilot projektir fara í gongd 1. september 2006.

**Krøv til umsøkjaran**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni og góðar royndir við tvørfakligum samstarvi
- fakligan áhuga innan sergreinirnar

**Vit kunnu bjóða**
- eitt fjølbroytt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samstarv
- fakliga menning
- innleiðslu

**Upplýsingar um størvini** eru at fáa við at ringja telefon 304500, lokal 6012, Monicu Brickman deildarleiðara ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Løn- og setanartreytir** smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

**Umsóknarfreistin** er 12. juli 2006 kl 12.00.
*Tað er umsøkjarans ábygd, at umsóknin er á starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.*

**Skivlig umsókn** merkt »umsókn til starv«, við avriti av prógvum, CV, autorisatión, viðmælum e.l. skal sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«*